


# Nei, harra løgmaður, Bjørn Kalsø sigur satt!



Val

**BJØRN KALSØ**
landsstýrismaður, Sambandsflokkurin

Bjørn Kalsø stríddist! men Javnaðarflokkurin stóð ikki saman við Sambandsflokkinum at fáa gjøgnumført, at landið kundi selja óbrúkt og nýggj fiskiloyvi. Ódámliga undanførslan hjá løgmanni er: "Men vit høvdu okkara at stríðast við, og málsøkið var nú einaferð tykkara".

**Uppskotið kom frá Bjørn Kalsø:**
Vit í samgonguni arbeiddu við uppskoti um, at landið skuldi kunna selja óbrúkt og nýggj fiskirættindi, uttan tó at taka teppið undan verandi vinnu. Haraftur-at var lógaruppskot um at staðfesta ognarrættin gjørt. Javnaðarflokkurin tók ikki undir við, at uppskotini vórðu løgd fyri Tingið, tí at Fólkaflokkurin var ímóti. Javnaðarflokkurin leggur seg ofta flatan fyri Fólkaflokkinum.

Úrslitið var, at uppskotið, um at selja óbrúkt og nýggj fiskiloyvi, ikki var lagt fyri Løgtingið, og lógaruppskotið um at staðfesta ognarrættin var lagt fram í broyttum líki. Tá mótstríðandi løgfrøðiligar útmeldingar komu um broytta uppskotið, vildi Javnaðarflokkurin, (Henrik Old tó undantikin), hava uppskotið tikið aftur, fyri heldur at lata rullandi skipanina frá 1998 halda fram. Boð um hetta komu frá løgmanni. Hetta vildu vit í Sambandsflokkinum ikki.

**Úrslit:**
Sambært umsitingini, og uttanhýsis løgfrøðiligum serkunnleika, var uppskotið, sum eg legði fram, í lagi. Vit vildu tó hava allan iva burtur um hetta týdningarmikla mál, og við smávegis broytingum fingu vit allar flokkar, uttan Sjálvstýrisflokkin, at taka undir við endaliga uppskotinum. Eitt bragd í sjálvum sær!

**Løgmaður samgonguleiðari í øllum málum:**
Síðsta brotið í grein tíni órógvar tó mest. Tú sigur: "Men vit høvdu okkara at stríðast við, og málsøkið var nú einaferð tykkara". Soleiðis málber ein samgonguleiðari seg ikki. Skulu úrslit spyrjast, má løgmaður standa øllum landsstýrismonnum við lið, ikki einans teimum úr egnum flokki, sum tín fatan sýnist at vera.

Hinvegin er gott, at tú viðurkennir, at Javnaðarflokkurin ikki hevur prædikað fyri Fiskidagabanka seinastu fýra árini. Tí tað er satt.

Seinastu fýra árini hevur, sum so mangan fyrr, verið ilt at fáa eyga á mun millum C og A. E vil bert loysing. Veljið tí B.

# Hvat er eitt OXYMORON



Val

**HILMAR AUGUSTINUSSEN**
Valevnið á Javnaðarlistanum

Orðið Oxymoron er samansett at tveimum Griskum orðum. OXY sum merkir "hvassur" og MOROS sum merkir "óhvassur". Vanliga verður hetta nýtt um eitt orð ella eina orðavending, sum mótsigur sær sjálvari.

"TjóveldisSambands-Flokkurin" er eitt OXYMORON

Tjóveldi er hvast. Teir siga loysing og ongantíð ov skjótt.

Sambandsflókkurin er óhvassur. Teir siga eitt í dag og annað í morgin.

Grundin til at eg kann siga hetta er, at formaður flokksins Kaj Leo Johannesen, fyri opnari mikrofon hevur staðfest, at Sambandsflókkurin vil hava fólkaatkvøðu um loysing ár 2012. T.e., vi endan av hesum valskreiðinum.

Tað eru søgd nógv orð um Sambandsflokkin, bæði líkt og ólíkt, men hann er ongantíð fyrr kallaður ein loysingarflokkur. Men nú gerða teir tað sjálvir.

Kanska er tað formaðurin sjálvur, sum er "HvassurÓhvassur".

Haldi bara, at tá ið hann ikki veit hvat hann sjálvur vil, so er tað ringt at vita hvat hann vil, nú hann bjóðar seg at stýra Føroyum.

Havi sagt tað fyrr, og eg haldi meg kunna siga tað eina ferð afturat. Loysing ella Samband er ikki spurningurin, vælferðin hjá tí einstaka er, og har eru ikki allir spurningar spurdir, tíans heldur svaraðir. Fyrst tá, er Javnaðarlokkurin klárur á tosað um loysing.

Her er javnaðarflokkurin púra "OXY" (hvassur).

Hugsa um tað 19. januar.

http://j.fo

# Mentunararvurin og føroyska málið – eru kraftin og sálin í okkara samleika



Val

**HELENA DAM Á NEYSTABØ**
Javnaðarflokkurin

Las í Sosialinum við áhuga samrøðu við fýra fólk, ið varða av og brenna fyri føroyska mentanarpallinum. Tey vóru øll á einum máli um, at okkum tørvar ein mentanarpolitikk. Og eg eri so púrasta samd við tey. Her skal politikkur og játtan á borðið.

Í grundini átti tað at verið so sjálvsagt og einfalt. Tí tað er bert ein grund til at Føroyar eru til, og at føroyingar eru eitt fólk. Tað er mentanararvurin og so sjálvandi føroyska málið. Tey bæði eru sálin og kraftin í okkara samleika. Skulu vit framhaldandi vera eitt land og eitt fólk, so verður tað bert eitt ríkt mentanarlív eins og ein hollur málsligur førleiki, sum kann tryggja, at so verður. Vit kunnu kanska tryggja okkum rímiligan vælstand – lata vit mentanina passa seg sjálva. Men tað verður ongantíð verulig vælferð, har sum mentanarloysi ræður.

At vinnan og mentan í dag ganga hond í hond, og at framkomin lond menna tað tey rópa mentanarbúskap sum vinnuveg í samfelagsbúskaparligum høpi, er gott, og vit hava nógv at læra av hesum ráki. Tað átti eisini at gjørt tað lættari at sett mentanina á politisku dagsskránna.

Men tað má ikki verða soleiðis, at bert tann mentanin fær betri sømdir, sum kann brúkast í einum vinnuligum høpi, og sum kann "branda" Føroyar.

Verulig mentan og rík mentan, er tann, sum torir út har tað er ivasamt, um man grynnir. Eitt ríkt mentanarlív bjóðar gomlum vanum og stirvnum hugsanum av. Tí má tað ikki fjøtrast, men sleppa at gera neyðug mistøk. Og tí mugu vit tryggja okkara skapandi fólki arbeiðsumstøður og sømilig livukor.

Kanska loysir tað seg ikki í fyrstu syftu – tað sum tey avrika. Men vit kunnu vera vís í, at sleppa tey einki at avrika, so er tjóðin steindeyð.

# Sáttmáli um rættindi teirra brekaðu



Val

**HEÐIN D. POULSEN**
Sjálvstýrisflokkurin

Ikki einans skal sáttmálin samtykkjast, men skulu rættindini, sum ásett í sáttmálanum staðfestast í føroyskari lóggávu. Tað verður stórt arbeiðið, tí lítið er slóða frammanundan, men stig fyri stig koma vit á mál.

30. mars í fjør var ein altjóða fagnaðardagur, tá undirskrivaðu 86 limalond hjá ST altjóða sáttmálan um rættindu teirra brekaðu.

Sáttmálin inniheldur grundleggjandi rættindi hjá teimum sum bera brek og sum nakað heilt nýtt, so eru ásetingar um rættin til atkomu og um javnstøðu fyri brekað, harafturat bannar sáttmálin øllum formi fyri mismuni vegna brek.

Umframt hini Norðurlondini, hava øll ES londini tikið undir við Sáttmálanum og hava somuleiðis givið til kennar, at tey fara at fylgja ásetingunum í sáttmálanum. Hetta mugu vit eisini gera.

**Skal samtykkjast í ár**
Í Føroyum eru vit longu eftirbátur í mun til restina av Evropa, tá tað kemur til rættindini hjá teimum sum bera brek, tí er hesin sáttmálin eitt gylt høvi hjá okkum at raðfesta tey sum bera brek.

Sjálvstýrisflokkinum fer í tráð við valskrá sína, at syrgja fyri, at sáttmálin um rættindi teirra brekaðu verður samtyktur og virdur.

Meira um hetta og annað á www.hedindp.com

# Alivinnan – glansmynd og spøkilsir



Val

**BJØRT SAMUELSEN**
Tjóðveldi

Tað gongst sera væl við alivinnuni í løtuni. Deyðstíttleikin av útsettum smolti er metlágur, vøksturin sera góður og tamarhald er á fiskasjúkum. Men handan jaligu myndina spøkir ein álvarsom hóttan.

**Lønar seg at taka ábyrgd**
Alivinnan lá fyri fáum árum síðani í skeljasori. Orsøkin var einføld: Hvørki myndugleikar ella vinnan høvdu tikið neyðug atlit, tá talan er um at ala livandi djór í náttúruni. Men vinnan ruddaði upp, og í felags taki við myndugleikarnar eydnaðist tað at venda gongdini, so bæði framleiðsla og útflutningur vaksa. Vinnan er eitt bjart dømi um, at tað at taka fulla ábyrgd ofta kostar nakað í fyrstu syftu, men lønar seg fleirfalt í longdini.

**ES-avtalan spøkir**
Vit hava gjørt sonevndu veterineravtaluna við ES, men fylgja ikki fleiri av krøvunum í avtaluni. Tað kann brádliga koma at geva alivinnuni, eins og fiskivinnuni, álvarsamar trupulleikar við útflutninginum. Hetta er ábyrgdin hjá ovasta myndugleika á økinum.

Tjóðveldi og eg vilja leggja stóra orku í at tryggja, at Føroyar sjálvandi fylgja teimum sáttmálum og avtalum, ið vit binda okkum til – eitt nú hesa ómetaliga týdningarmiklu avtalu við ES. Eitt nýtt bakkast í alivinnuni má ikki henda orsakað av skeivari raðfesting hjá myndugleikanum!